VB-VÍF 19-18 (12-5):

# So fekk VB steypið

**Til tíðir vórðu meistararnir úr VÍF út- og niðurspældar, men við einum seigum taki gjøgnum allan seinna hálvleik, var kortini um reppið, at VB enn einaferð misti eina steypafinalu**

COCA-COLA KAPPINGIN, KVINNUR

*Jákup Mørk*



*Tað var fyrst og fremst í verjupartinum, at VB vann dystin. Fyrra hálvleik slapp VÍF snøgt sagt ikki framat málinum, og tó at orkan var um at ganga undan seinastu løtuna, so megnaðu vágbingarnir at halda fast*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kvinnufinalan var ein gysari. Einki er at ivast í tí. Við eini fullsettari høll vóru karmarnir kring finaludystirnar á toppinum, og so var tað upp til liðini at skapa rest.

### Stórur munur

Fyrstu longu løtuna var tó ikki nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um eina framúr spennandi finalu. Undan dystinum høvdu báðir partar á munni, at tað fyrst og fremst ráddi um at fáa verjupartin at koyra, og hetta var eisni sjónliga aðalmálið fyrstu longu løtuna.

Tað tóktist tó skjótt greitt, at var nøkur yvirvág, so var tað VB, sum átti hesa. Nakrar ferðir megnaðu tær at spæla seg ígjøgnum verjuna, men mest sum hvørja ferð rendu tær seg bara í livandi múrin í VÍF málinum, soleiðis at VÍF ikki misti dystin úr eygsjón alt fyri eitt.

Tað er tó mørk fyri, hvussu leingi ein málverji kann halda liði sínum í dystinum, og sum frá leið í dystinum, og sum frá leið mátti eisini hon geva skarvin yvir.

Greiðasta staðestingin restina av fyrra hálvleiki mundi vera, at VÍF ikki longur er sterkasta liðið í føroyskum kvinnuhondbólti. Við eini framúr sterkari verju syrgdu vágbingar fyri, at meistararnir at kalla ikki fingu fótin fyri seg. Hvat tær hjá VÍF so enn royndu, so vórðu tær antin steðgaðar av sterku VB-verjuni, ella av eini væl leikandi Davi Ylatie í málinum, og hinvegin gjørdist revsingin bara alt meira eirindaleys. Serstakliga Daiva Tuomaite tóktist vera væl uppløgd, men ikki minst hevði tað týdning, at VB eisini megnaði at skora av veinginum, soleiðis at breidd fekst í álopsspælið.

Hjá VÍF restaði hinvegin nógv í, í mun til tað spælið, sum hevur gjørt liðið einaráðandi seinnu árini. Orsakað av tøttu VB verjuni gekk álopsspælið sera striltið, og títtu plássflytingarnar – sum ivaleyst høvdu til endamáls at órógva VB-verjuna – tóktust ikki betra um samanhangin. At hetta ikki mundi vera dagurin hjá VÍF sást eisini, tá heldur ikki Sóley Mikkelsen hevði hepni við sínum gjøgnumbrotsroyndum, men ístaðin mátti síggja mest sum hvørja einastu av hesum fara sendandi beint á VB-málverjan.

Fyri viku síðani royndi VÍF seg eitt skifti við mansverju ímóti VB, uttan at hetta hepnaðist serliga væl. At hetta eisini varð nýtt seinastu løtuna undan steðginum sigur helst nakað um, hvussu ringum skørum VÍF var í, og somuleiðis at Manuela Stan at enda ikki tóktist orka ágangandi VB-spælið meira, men heldur tók sær ein túr á beinkinum, so hon kundi koma fyri seg aftur.



*Og so tustu tey inn á vøllin. Vágbingarnir á áskoðaraplássinum mundu sita á nálum seinasta góða korterið, og tí var tað ein sonn forloysing, tá seinasta bríkslið endiliga ljóðaði*

### Noktaðu at gevast

Grundað á gongdina í fyrra hálvleiki, so var ikki løgið, um vágbingar hildu, at nú var mest sum sloppið. Í øllum førum mundu tey á áskoðaraplássunum kenna tað so, men hinvegin sýndu leikararnir eingi tekin um at taka tað róligt.

Heldur royndu tær framvegis at koyra VÍF liðið í senk við ágangandi spælinum. Men VÍF gav seg ikki. Við alla tíðina hart arbeiðandi Sóley Mikkelsen sum primus-motori byrjaðu tær spakuliga at koma inn aftur í dystin. VB, sum undan hesum hevði mest sum jagstrað VÍF runt á vøllinum, gjørdist brádliga jagstraða liðið, og tað var sjónligt, at hetta ikki var nakað, sum hóvaði teimum serliga væl.

Spakuliga tók VÍF seg inn á VB, sum alt meria sjónligt kendu seg kroystar. Time-out varð tikið, soleiðis at venjarin aftur kundi fáa skil á leikararnar, men fyrstu løtuna tóktist heldur ikki hetta at hjálpa nakað stórvegis. Tíggju minuttir fyri leiklok var munurin minkaður niður í eitt mál, og so mundu sjálvt mest svartskygdu vestmenningarnir kenna roykin av sigrinum, meðan vágbingarnir í høllini gjørdust alt meira fámæltir.

Og so var av álvara spenningur aftur í dystinum. VB gjørdi við tveimum fylgjandi málum ein seinasta vørr at skræða seg leyst aftur, men VÍF tóktist framvegis vera liðið, sum hevði flestu kreftinar eftir. Trýstið á VB var øgiligt. Áskoðararnir í høllini sótu mest sum á nálum, meðan VÍF aftur togaði eitt mál fyri og annað eftir inn á VB.

Kanska helt onkur, at VÍF fekk fekk mønustingin, tá Daiva skeyt sítt níggjunda mál í dystinum til 19-17, men við einum minutti eftir setti VÍF setinasta spurtin inn. Nicoleta minkaði aftur um munin, og tá VB so ikki fekk nyttu úr seinasta álopinum, stóð av álvara á gomlum nøglum. VÍF setti skjótálop í gongd, og tó at Nicolina hevði fleiri møguleikar at avlevera bóltin, so endaði alt í einum ruðulleika, har VÍF bert fekk tríggja-metra kast, og so var liðugt. Eitt dramatiskt eftirspæl var eisini, tá Reda Kurkaskiene fekk ein snudd í andlitið í seinatu skotroyndini hjá VÍF, men tíbetur var hetta ikki so ógvusligt, sum líkt var til, og eftir eina lítla pentu var hon eisini klár til at fagnast saman við liðfeløgunum.

VB er steypavinnari. Tað var hart, og móti endanum vóru tað helst bert sekundini, sum skiltu VÍF frá í minsta lagi einum javnleiki, men tað kann alt vera tað sama. Steypavinnarar eru tær.

### Dysturin í tølum

**VB-VÍF 19-18 (12-5)**

Støður í dystinum:
10 min 4-1
20 min 8-3
40 min 14-7
50 min 16-15

Málskjúttar:
VB: Daiva Tuomaite 9(4), Gurið Mortensen 4, Reda Kurkaskiene 4, Rannvá Augustinussen 1, Laila Jespersen
VÍF: Sóley Mikkelsen 6(2), Nicoleta Radu 5(2), Jacklin Durhuus 3, Alis Høghamar 2, Nicolina Eyðbjørnsdóttir
Brotskøst: VB 6, VÍF 5
Útvísingar: VB 2, VÍF 5
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Eyùn Samuelsen. Løgdu eina greiða linju beinanvegin, og hildu hesa ígjøgnum allan dystin.





*Talan var um sanna steypafinalu. Til tíðir gott spæl, og alla tíðina ein stríðsvilji, sum lýsti úr hvørjum einstøkum leikara*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

StÍF-Kyndil 25-26 (11-12):

# Kyndil aftur á toppin

**Eftir trý steypaleys ár vann Kyndil aftur gull, tá teir bastu StÍF í finaluni, men tað skuldi ein gysari av teimum stóru til, áðrenn hetta kundi staðfestast**

COCA-COLA KAPPINGIN, MENN

*Jákup Mørk*

Tað er sjáldan, at strandingar hava havt nakra orsøk til at iðra seg um, at teir fyri tveimum árum síðani fingu Marian Cirloganescu til felagið. Rumenski málverjin hevur í nógvum førum verið avgerandi á vágskálini, tá javnir dystir hava verið leiktir, og enn man hann so ongan tíð hava kostað teimum nakran sigurin.

Ein avleiðing av hesum var tó, at Johan Danielsen fór at leita sær aðrar avbjóðingar, og leygardagin var tað fyrst og fremst honum at takka, at StÍF ikki gjørdist steypavinnari.

Tað var tó ikki bert málverjin, sum einsamallur avgjørdi dystin. Tó at Johan ígjøgnum allan dystin á tamb hevði fleiri framúrskarandi bjargingar, so so var hetta líka sum bert kryddið í finaluni. Tí talan var sanniliga um ein rættan steypadyst.

Undan hesum høvdu liðini fyri eini viku síðani leikt javnleik, og tað var eisini skjótt at staðfesta, at eingin parturin undir nøkrum umstøðum skuldi rokna við nakrari lættari uppgávu leygardagin.

Eins og í dystinum fyri viku síðani, so legði Kyndil hart út í verjuspælinum. Endamálið var heilt víst at órógva strandingarnar, soleiðis at hesir ikki fingu vanliga kvika álopsspælið at koyra, og hetta eydnaðist eisini partvíst. Meira týdningarmikið var tó kanska, at Kyndil samstundis hevði hepni við at koyra eitt hampuliga trygt álopsspæl sjálvir. Hondbólturin hjá StÍF er vanliga bygdur á eina kvika verju, sum aloftast er før fyri at tryggja liðnum fleiri skjótálop, og tað var greitt, at Kyndil ikki ætlaði, at hetta skuldi henda.

### Breitt spæl

Hinvegin var heldur ikki so ofta, at teir grønu sluppu í mótálop, og hetta gjørdi tað fyri stóran part neyðugt hjá liðunum at leggja dentin á breiddina í álopsspælinum. Roynt varð við pressspælið upp frá bakkinum, soleiðis at vongspælararnir kundu spælast leysir, og hjá báðum pørtum hepnaðist hetta hampuliga væl. Ikki minst hjá Kyndli, har Heini Bendtsen var sera tryggur í avslutningunum.

Og sæð burtur frá hesum, so fingu áskoðararnir eisini nakrar av bestu bakspælarunum í landinum at síggja. Costin, Sveinur og Artur gjørdu alt tað, sum teir vóru mentir móti kyndilsverjuni, sum hinvegin alla tíðina legði sera nógv fyri í royndunum at steðga mótstøðuni, og tað sama var galdandi hinvegin, tá Jacob, Finnur og Høgni royndu at gera sítt til at órógva mótstøðuverjuna.

Og so hevði Kyndil eisini trumf við á liðnum. Jónleif Sólsker hevði annars boðað frá um jóltíðir, at hann fór ikki longur at vera tøkur hjá liðnum, men hann var millum leikararnar á liðnum, og tað var eisini skjótt greitt, at hann ikki var komin, bara fyri at sita seg til eitt heiðursmerki.

### Kontant verjuspæl

Fyrri hálvleikur var alla tíðina sera javnur. Strandingar høvdu leiðsluna fyrstu lítlu løtuna, men um miðjan hálvleiki fekk Kyndil nakað av ferð á, og tó at munurin ongan tíð var heilt stórur, hildu teir seg alla tíðina beint frammanfyri.

Og hetta hildu teir fast við eftir steðgin. Um nakað, so gjørdist verjuspæli nú enn meira ágangandi. Strandingar tóktust eins og í dystinum fyri viku síðani als ikki at trívast í kontantu kyndilsverjuni, og spakuliga byrjaði Kyndil at draga frá. At Johan so eisini byrjaði seinna hálvleik við eini dupultbjarging, tá Alexandur fyrst skeyt brotskost, og síðani stóð púra leysur við returinum, mundi ikki gera tað betri í so máta,

### Dramatiskur endi

Tíggju minuttir fyri leiklok var Kyndil framvegis á odda við trimum málum. Gangurin av sonevndur klappu-køllunum, sum grønu áskoðaranrir høvdu fingið til vega úr Danmkar harðnaði alsamt, so hvørt sum steypið kendist nærri og nærri, men enn høvdu strandingar ikki givið upp.

Tað mundi eisini órógva, at Kyndil mitt í øllum fekk eina útvísing til beinkin, tí venjarin hevði flutt seg út um tronga geiran framman fyri benkirnar. Strandingar minkaðu munin niður í eitt mál, men tá Kyndil so aftur sendi tvær ferðir í netið, mundu tey flestu halda, at nú var ballið búið. Spenningurin kom tó aftur í aftur, tá Hans Áki fyri fyrstu ferð í dystinum misnýtti brotskast. Stutt undan var eisini brotskaststøða, har Hans Áki í fyrsta umfari bað seg undan at skjóta, men tá eingin annar vildi taka ábyrgdina, smekkaði hann kortini til. Hesa ferð bjargaði Marian tó royndini, og tá StÍF so eisini skoraði til 25-26, stóð brádliga heilt nógv á.

Kyndil megnaði ikki at fáa nakað burtur úr sínum seinasta álopið, og so fór StÍF í kontra. Bent Djurhuus varð sendur avstað, men hóast hann at síggja til varð tikin av mótleikara, áðrenn hann fekk skotið, so lótu dómararnir ikki við seg koma. Málkast varð dømt, og so var Kyndil steypavinnari.

Fagnaðurin hjá teimum grønu vildi mest sum ongan enda taka, og tað var eisini skilligt. Sigursvanda felagið hevur einki vunnið, síðani steypasigurin á grannunum fyri trimum árum síðani, men nú stendur aftur eitt nýtt steyp í felagshúsinum, og so kunnu menn aftur líta framá, heldur enn bara at minnast, hvussu væl tað plagdi at ganga fyrr.

Hjá strandingum var lagið sjálvsagt eitt annað. Tvær ferðir á rað hava tað verið teir, sum hava vunnið finaludystin móti liðum, sum í landskappingini hava staðið seg betri, men hesa ferð vórðu tað teir, sum vóru við undirlutan móti lægri staddum liðum.

At endin av dystinum bleiv sum hann bleiv, mundi heldur ikki gera lagið betri, men um tað kann vera nøkur troyst, so kunnu strandingar minna seg sjálvar á, at tríggjar av seinastu fýra ferðunum hava taparарnir í steypfinaluni vunnið FM.

### Dysturin í tølum

**StÍF-Kyndil 25-26 (11-12)**

Støður í dystinum:
10 min 2-2
20 min 7-8
40 min 14-17
50 min 19-22

Málskjúttar
StÍF: Sveinur Justinussen 6(1), Alexandur Johansen 5(1), Artur Johansen 5, Andre F. Danielsen 2, Bent Djurhuus 2, Costin Dumitrescu 2, Jón Rasmussen 1, Marius Joensen 1
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 9(5), Heini Bendtsen 6, Jacob Jónsson 4, Jónleif Sólsker 3, Janus Einar Sørensen 2, Høgni Klein 1, Finnur Hansson
Brotskøst: StÍF 5, Kyndil 6
Útvísingar: StÍF 4. Kyndil 5
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.